## Klumman



**Eirikur Lindenskov**
blaðstjóri

### Cigarin, mannarættindi og forstoppilsi

Tað er so herligt at hoyra hvinini frá roykjarum, sum halda tað vera í ordan at forpesta tilveruna hjá øðrum.

Hósdagin hoyrdu vit ein advokat – ein serfrøðing í mannarættindum – halda tað ganga privatlívinum ov nær, at hann ikki sleppur at festa sær í ciruttina á advokatskrivstovu síni. Men tað skal valdast, hvat tú heldur ganga privatlívinum ov nær.

Hetta er eitt gott dømi um, at tað altíð eru privat áhugamál sum koma í fremstu røð. Advokaturin – og serfrøðingurin í mannarættindum – heldur tað vera eina privata søk, at hann ikki sleppur at forpesta arbeiðsdagin hjá t. d. skrivara sínum...

Tað kann vera, men vit onnur, sum hava dugað og hava megnað at leggja heilsuskaðiliga tubbakkið til viks – ella als ongantíð hava fest okkum í, kunnu so bara fegnast um, at landsstýrismaðurin eisini hevur lagt tubbakkið til viks, og at hann hevur rygg og vilja til at leggja hetta uppskotið fram.

Eisini formaður Javnaðarfloksins á tingi hevur fingið ilt fyri bróstið av hesum. Hann er so passaliga politiskt ókorrektur, at man ikki kundi væntað annað, enn ein eina útsøgn sum »puritanskt forstoppilsi«.

Her er tað aftur privatu áhugamálini, sum koma í fremstu røð. Hví hevur hann ikki somu hugsan, tá hann áleggur okkum eyka skatt og avgjøld? Hví er tað ikki at ganga privatlívinum ov nær? Ella tá tingmenn tryggja síni ellisár við feitari pensjón, meðan palliba er við sviðusoð?

Tað skal sjálvandi valdast, hvussu vit seta tingini í perspektiv – og hvat endamálið er.

Eg legði av at roykja fyri 19 árum árum síðani. Um eg skuldi keypt tann dagliga sigarettpakkan síðani, hevði tað – við dagsins prísum – kostað mær 346.750 kr, og fyri at goldið tað skuldi eg tjent tað dupulta: 693.500 kr. Við vanligari tímaløn skuldi eg arbeitt í yvir trý ár – bara fyri at goldið tubbakkið!

Umframt heilsuskaðan, so kann persónliga frælsið eisini verða dýrt (og tápuliga) keypt...

umborð

# Skipskokkur og slaktari við Eystnesi

## Umborð



Vilmund Jacobsen
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

**- Eg var í starvsvenjing á Hotel Føroyum, meðan eg gekk á kokkaskúla í Klaksvík, og tað var leiðandi kokkurin á hotellinum, sum mælti mær til at fara í læru sum slaktari. Fór eg ongantíð á kokkaskúla, hevði eg heldur ongantíð blivið slaktari, sigur kokkurin umborð á línuskipinum Eystnesi, Eyðbjørn Andreasen**



*- Nú eri eg so aftur sjómaður, og mær dámar væl at sigla. Sum er, verður hetta mítt lívsstarv fyribils – og eg havi í løtuni ikki ætlanir um annað enn at vera verandi sjómaður, sigur Eyðbjørn Andreasen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hesaferð hava vit ringt umborð á línuskipið Eystnes. Vit høvdu skiparan, Jákup Eli Ejdesgaard og nýggja kokkin umborð, Eyðbjørn Andreasen, í telefonini.

Eystnes byrjaði hendan túrin seinasta leygardag og mikudagin, tá ið vit frættu, vóru teir staddir einar 7-8 fjórðingar úr endanum á Suðuroynni.

- Vit hava roynt her, síðan vit komu út. Aftrat okkum er Fugltúgvan her, og teir komu nakað seinni enn vit.

Skiparin, Jákup Eli Ejdesgaard, sigur, at teir fingu 14.500 pund á setuna týsdagin, men annars hevur fiskiskapurin verið brúkiligur, eini 10.000 pund í miðal um dagin.

Hann vísir á, at teir línubátur, sum vóru fyrstir úti eftir nýggjár og gjørdu ein skjótan túr, seldu rættiliga væl.

- Onkur fekk ein miðalprís, sum lá oman fyri 20 krónur fyri kilo, og tað er óførur prísur.

Línubátarnir eru bundnir at streymviðurskiftum. Tí fara ofta fleiri út í senn – og koma tískil eisini innaftur um somu tíð. Men tað eru nakrir, sum eru hepnir og kunnu gera onkran stuttan túr og selja, meðan minni línufiskur er á marknaðinum.

- Vit ætlaða okkum at fiska í eina lítla viku aftrat. Veðrið hevur verið gott, men í kvøld sigur hann storm, sigur Jákup Eli Ejdesgaard. Eystnes var til fiskiskap í 237 dagar í fjør. Skipið fiskaði 1.100 tons, sum vórðu seld fyri 16,6 miljónir krónur. Manningarparturin var 452.000 krónur.

Í telefonini hendan dagin, vit ringdu umborð á Eystnes, hittu vit eisini kokkin, Eyðbjørn Andreasen, sum er fyrsta túrin við skipinum.

- Eg eri nýliga byrjaður at sigla aftur og var soleiðis tríggjar túrar fyri jól við Eysturoyingi. Nú eri eg komin umborð á Eystnes, og her dámar mær sera væl. Fólkið er rakst, og arbeiðsumstøðurnar sum kokkur eru sera góðar. Her er alt, sum mær tørvar.

Eyðbjørn, sum bæði er útbúgvin skipskokkur og handilsslaktari, hevur eisini kokkast umborð á øðrum skipum.

- Eg haldi, at umstøðurnar umborð á Eystnesi lutfalsliga eru líka so góðar, sum umborð á Akrabergi, ið er eitt nógv størri skip.

Umborð á Eystnesi eru 14 mans.

- Vanliga eri eg ikki á dekkinum, men eg tók mær oljuklæðini við, tá eg fór, sigur fryntligi kokkurin.

Eyðbjørn heldur seg vita, at hann hevur fingið fastan kjans við Eystnesi, sum hann heldur vera eitt stórt og gott skip.

- Um eg sleppi, ætli eg mær at verða umborð út í eitt í fyrsta lagi fram til summarið. Vit eru jú inni ímillum túrar, og streymur og veður gera, at vit hóast alt eisini fáa nakrar dagar í landi.

Eyðbjørn Andreasen hevur siglt í eini 10 ár tilsamans, og hesi árini hevur hann verið umborð á fleiri skipum – heilt frá trolbátinum Hansu Mariu til flakatrolaran Akraberg.

- Eg fór á kokkaskúla í Klaksvík eftir at Beinir, sum eg tá hevði verið við, var farin av knóranum í kreppuárunum, sum tá vóru. Hetta var ein tíð, har trupult var at fáa kjans við nøkrum skipi. Eftir at hava gingið heima í eitt ár, avgjørdi eg at fara á kokkaskúla. Prógvið sum skipskokkur fekk eg í 1994.

Eyðbjørn sigur, at um hann ongantíð var farin á kokkaskúla, hevði hann heldur ongantíð blivið slaktari.

- Eg var í starvsvenjing á Hotel Føroyum, meðan eg gekk á kokkaskúla, og tað var leiðandi kokkurin á hotellinum, sum mælti mær til at fara í læru sum slaktari.

Í 1999 fór hann í læru sum handilsslaktari í Miklagarði í SMS, og eftir at hann varð liðugur at læra í 2003, arbeiddi hann sum slakari har í eini trý ár.

- Hotell-kokkurin segði, at fór eg í læru sum slaktari, fór eg at læra nógv meira um tað at hagreiða kjøt. Á kokkaskúlanum snúði læran seg meira um ymiskar rættir, pynt og annað.

Nú er Eyðbjørn so aftur sjómaður burtur av.

- Mær dámar væl at sigla. Sum er, verður hetta mítt lívsstarv fyribils – og eg havi í løtuni ikki ætlanir um annað enn at vera verandi sjómaður. Sjóverkurin bilar ikki, men tá ið vit fóru avstað hesaferð, hevði eg sjóverk í eitt gott samdøgur ella so, sigur Eyðbjørn Andreasen.

Yngsti maður umborð á Eystnesi hendan túrin er 17 – og tann elsti er 52. Elsti maðurin, sum annars siglir við skipinum, er 65 ár, men hann er ikki umborð hendan túrin.

Umborð er tískil ein góður blanding-ur av ungum, tilkomnum og eldri monnum – ella, sum ein maður tók til her í blaðnum:

- Vit hava bæði nýtt og gott gamalt.